# Hetta var at liva við

**HB spælararnir ásannaðu, at teir høvdu havt møguleikan at binda um, og at teir síðstu løtuna høvdu verið undir stórum trýsti**

MEISTARARNIR
*Jóannes Hansen*

HB spælararnir vóru fegnir og avgjørt ikki vónbrotnir um, at tað ikki hevði eydnast teimum at fáa øll stigini í Klaksvík. Tað hevði leingi sæð soleiðis út, at tað skuldi fara at eydnast.

– Eg var vónbrotin, tá ið teir í síðsta sparkinum í dystinum javnaðu til 1-1. Tá ið vit so leingi høvdu megnað at standa ímóti trýstinum, áttu vit eisini at havt megnað tað í síðstu sekundunum, helt veteranurin í miðverjuni, Jan C. Dam.

Rógvi Jacobsen var samdur við Jan, men kortini var hann ikki vónbrotin:

- Hetta var ein av dystunum, sum vit frammanundan roknaðu sum sera torføran. Tíbetur høvdu vit tryggjað okkum meistaraskapin, áðrenn vit fóru til Klaksvíkar. Vit kunnu væl liva við at hava fingið eitt stig á útivølli ímóti KÍ. Men vit kendu ikki okkara vitjunartíð.

Jan C. Dam var samdur í, at einki var farið av HB og meistaraskapinum, hóast teimum ikki hevði eydnast at vinna í Klaksvík:

– Eg havi spælt við KÍ, og mær dámar væl klaksvíkingar. Sjálvandi stríddist eg alt, sum eg orkaði, fyri at vit skuldu fáa øll stigini. Men tá ið eg sá, hvussu ovurfegnir, teir vóru — bæði á vøllinum og kring vøllin — um, at tað hevði eydnast teimum at javna, og dómarin so bríkslaði av, so mintist eg aftur á, hvussu stóran týdning fótbólturin og KÍ hava í Klaksvík. Eg unti teimum tað upp á ein máta, og tá var tað skjótt, at vónbrotiskenslan hvarv, staðfesti fryntligi veteranurin.

KÍ-HB 1-1 (0-1):

# Stórur fagnaður í Klaksvík

**Eftir at meistararnir í ein tíma høvdu spælt heimaliðið niður og norður, eydnaðist tað klaksvíkingum síðsta hálva tíman at stríða seg framat aftur**



*Eftir at HB hevði átt stóran part av dystinum, eydnaðist tað móti endanum KÍ at trýsta seg til javnleik*

KÍ-HB
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Fótbóltur er liðspæl. Liðavrikið eru treytað av, at ein stríðist fyri allar, og at allir stríðast fyri ein. Skal úrslitið gerast gott, so er neyðugt, at meginreglan verður hildin allar 90 minuttirnar og eisini í tíðini, sum dómarin leggur afturat.

Meistararnir úr HB løgdu út sum eitt ódnarveður í góðu fótbóltslíkindunum í Klaksvík, og fyrsta tíman høvdu teir KÍ rudduliga í sekkinum. Alt gekk fyri seg eftir treytunum hjá HB. Mótstøðumenninir tóktust kenna seg fjáltursstungnar, og meðan HB spælararnir fluttu seg væl fyri hvørjum øðrum og ofta megnaðu at samanspæla upp til einar tíggju ferðir, so eydnaðist millum lítið og einki hjá klaksvíkingunum.

Á sentrala miðvøllinum hevði Kári Nielsen leiklutin hjá leikbannaða Rúna Nolsøe, og tað megnaði hann væl. Vagnur Mohr Mortensen var í byrjunaruppstillingini eisini sentralur miðvallari, men tá ið Hallur Danielsen noyddist at taka seg burturúr við skaða, varð Vagnur fluttur aftur á vongverjan í høgru, og Jákup á Borg, sum hevði verið í fremstu røð og undir liðini á Rógva Jacosben, sum alla tíðina var væl innpakkaður, varð fluttur aftur á vongverjan í høgru.

HB hevði fleiri ungar menn á liðnum. Rasmus Nolsøe stóð seg væl á vongverjanum í vinstru, har uppgávan hjá honum fyrst og fremst var at byrgja fyri Arnholdi Joensen. Janus M. Joensen var neyðloysn í vinstra miðvallarborði fyri leikbannaða Heðin á Lakjuni, og hóast hann ikki hevði dynamikkin, sum Heðin hevur havt, so var Janus bara trivaligur.

Stóra HB yvirvágin í spæli bar málmøguleikar við sær, men tað eydnaðist bara eina ferð at fáa mál. Tíggju minuttir vóru farnir, tá ið Rógvi Jacobsen við høvdinum snittaði langt innkast úr høgru longri inn í brotsteigin. Klaksvíkingar royndu at senda út frá, og á brotsteigarmarkinum leyp Vagnur Mohr Mortensen upp og heilfluktaði sera hengisliga upp í nettakið.

Eitt fínt mál, og tað luktaði av, at HB skuldi gera fleiri mál. Jákup á Borg var púra blankur eftir innlegg frá innskifta Hendriki Rubeksen, men landsliðsmaðurin heilkiksaði stútaran, og Rógvi Jacobsen og Hendrik Rubeksen vóru heldur ikki heilt neyvir.

Fyrstu løtuna eftir steðgin hvinu bóltarnir um oyruni á KÍ málverjanum. Eftir álop í høgru og innlegg til handara stólpan sendi Jákup á Borg úr góðari støðu dygst uppum nærru samankomingina, Símun Eliasen sendi úr 25 metrum og í tvørtræið, og Rasmus Nolsøe var tætt við, tá ið hann sendi fríspark ímóti málinum. Men HB megnaði ikki at binda kjaftbandið um, og so kom KÍ burturúr aftur sekkinum.

## Rindaðu prísin

Í roynd at venda vánaligu gongdini broytti KÍ uppstilling. Sentralu miðvallararnir høvdu undan steðginum havt stórar trupulleikar. Tí varð Atli Danielsen fluttur úr miðverjuni og fram á álopskenda miðvallarplássið. Veteranurin Jan Andreasen loysti av í miðverjuni, og hann og Niclas Niclassen funnu væl saman.

At Atli var komin á miðjuna bar størri tyngd við sær. Tað munaði serliga nógv, tá ið fleiri HB spælarar tóku at møðast. Teir høvdu jú arbeitt nógv í fyrra umfarinum, og tað kendist kanska serliga meint henda fyrsta sunnudagin, eftir at teir høvdu tryggjað sær FM heitið.

Heimaáskoðararnir, sum saman við teimum bláu høvdu verið rættulig dovnir undan steðginum, kvakladust við, og seinni parturin av seinna umfarinum gjørdist til satt drama, har KÍ hevði meiri orku og størri vilja at trýsta mótstøðumenninar, sum royndu at verja og dúva upp á kontra. Ferð eftir ferð gjørdist tað vandamikið, tá ið langar sendingar vórðu sendar til Ova Nysted og Erling Fles, sum úr spískum í vinstru sendi í handara stólpan.

Ovi Nysted hevði úr góðari støðu heilkiksað fluktara eftir innlegg frá Erlingi, og sum tíðin gekk, tóktist tað sum um, at eingin úrtøka skuldi spyrjast burturúr.

Dómarin hevði lagt seks minuttir afturat, og teir vóru hendingarríkir. Fyrst var Vagnur Mohr Mortensen rikin av vøllin fyri annað gula kortið (tað tóktist ivasamt, um Vagnur — soleiðis sum dómarin metti — óregluliga hevði steðgað Ova Nysted í gjøgnumbroti), og so vórðu klaksvíkingar so at siga forloystir. Atli Danielsen sendi fríspark úr góðari støðu og í manngarðin. Bólturin støkk aftur til landsliðsmannin, sum hegnisliga spældi til Erling Fles, sum sendi ímóti málinum. Útsýnið hjá annars trygga Bárði Johannesen var einki serligt. Hann megnaði ikki at halda bóltinum, sum støkk út til Jacob Bymar, sum við síðsta sparkinum av øllum javnaði til 1-1.

Dramaið var liðugt, og fagnaðurin á klaksvíkingum var sum um tað vóru teir og ikki HB, sum hevði vunnið FM. HB spælararnir vóru pøstir og ivaleyst eisini nøgdir við, at stríðið var lokið. Sum stemningurin og ágangurin á teirra mál var fram ímóti dystarenda, kundi tað havt hent seg, at tað hevði verið heimaliðið, sum eisini hevði átt næsta málið!

Liðavrikið hjá HB var gott í ein stóran tíma. Tað fingu teir eitt mál burturúr. Liðavrikið hjá KÍ var gott í ein lítlan hálvan tíma.Tað fingu teir eitt mál burturúr.

## FAKTA UM DYSTIN

**KÍ-HB 1-1 (0-1)**
0-1: Vagnur Mohr Mortensen 10.
1-1: Jacob Bymar 90.
**KÍ:** Mathias Samuelsen - Leon Bjartalíð, Atli Danielsen, Niclas Niclassen, Símun Joensen - Arnhold Joensen (Frank Joensen, 87.), Jan Joensen, Jacob Bymar, Eyðun Klakstein (Jan Andreasen, 46.) - Erling Fles, Ovi Nysted
**Gult kort:** Ovi Nysted
**HB:** Bárður Johannesen - Hallur Danielsen (Hendrik Rubeksen, 20.), Jan C. Dam, Símun Eliasen, Rasmus Nolsøe (Páll M. Joensen, 80.) - Vagnur Mohr Mortensen, Kári Nielsen, Rókur Jespersen, Janus M. Joensen - Jákup á Borg, Rógvi Jacobsen
**Gult kort:** Vagnur Mohr Mortensen (2), Páll M. Joensen
**Reytt kort:** Vagnur Mohr Mortensen 90.+
**Dómari:** Jens Petur Brattalíð



# Jákup aftur skaddur

**Dreingjaliðsmálverjin var heilt kløkkur, tá ið tað dygst undan dystarbyrjan gjørdist greitt, at hann skuldi verja málið í staðin fyri landsliðsmálverjan**

KÍ MÁLVERJIN
*Jóannes Hansen*

Mathias Samuelsen var leygardagin við KÍ dreingjunum í Vágum. Hann hevði fingið boð til HB dystin sunnudagin, men hann roknaði við, og tað var eisini ætlanin, at hann skuldi sita á beinkinum sum eykamaður hjá Jákupi Mikkelsen.

Tá ið teir báðir hitaðu upp, bendi alt á, at Jákup skuldi spæla. Men í síðsta sparkinum undir upphitingini dragnaði tað aftur í lærinum hjá landsliðsmálverjanum, og so varð 16 ára gamli drongurin fyri fyrstu ferð nakrantíð á besta liðnum sendur inn á heimavøllin. Tað kom púra óvart á, men Mathias stóð seg væl. Hann var tryggur, tá ið HB legði innfyri í brotsteigin, og tá ið HB spælararnir vóru í góðum støðum, sendu teir í tværtræ, uppum ella við síðuna av.

Hetta var elddópurin hjá Mathiasi Samuelsen á heimavølli. Næstsíðsta sunnudag stóð hann royndina á útivølli, tá ið KÍ vann 2-1 á Skála.

Hvussu tað nú fer at roynast hjá Jákupi Mikkelsen er ikki greitt enn. Fríggjakvøldið vandi hann næstan, sum hann plagar, men sunnudagin var aftur galið. Tveir dystir eru eftir í landskappingini, og so eru tað landsdystirnir á Kypros og í Írlandi.

B36-VB 3-1 (3-0)

# Silvurið er heilt nær

**B36 vann ein ómaksleysan 3-1 á skerdu vágbingunum, og eru nú heilt nær silvurmerkjunum**




*Ronnie Samuelsen var rættiliga í essinum sunnudagin, og við tveimum málum var hann høvuðsmaðurin í B36-sigrinum*

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var eitt sindur av einum antiklimaks hjá B36 sunnudagin. Eftir at teir farna vikuskiftið definitivt máttu boyggja seg fyri HB, vóru tað nú silvurmerkini, sum stoðu upp á spæl. Og hóast hetta í sjálvum sær skuldi verið nakað at barst fyri, so var tað ikki hetta, sum tey í árstalsfelagnum høvdu ímyndað sær undan kappingarbyrjan.

## Ronnie legiði fyri

Lukkutíð fyri B36, so stóð ikki stórt betri til hjá mótstøðuliðnum sunnudagin.

VB hevur í ár havt eina støðu nakað undir miðal, og tó at hetta helst partvíst kemst av ættarliðsskiftinum, sum í hesum árum fer fram í Vági, so er einki at ivast í, at vágbingar sjálvir halda seg vera heimahoyrandi nakað longri uppi á talvuni.

At gestirnir so eisini vóru skerdir, tí fleiri stuðulsleikarar vóru burturfrá, gjørdi ikki teirra støðu betri, og tað var heldur ikki serliga leingi, áðrenn B36 hevði staðfest, at her skuldu stigini so ongan veg fara.

Ronnie Samuelsen setti hol á longu eftir lítlari løtu, tá hann royndi seg við góðum skoti, og bert lítið korter seinni stóð 2-0. Hesaferð fekk Ronnie eina góða sending inn um VB-verjuna, og so gav hann ikki Bjarna stórvegis møguleikar at bjarga.

B36 sat nú so ruddiliga á dysitnum. Hóast teir ikki sýndu tað heilt stóra fótbótsspælið, so tóktist eingin ivi vera, hvat liðið var tað betra, og eftir at Egil á Bø stutt fyri steðgin hevði økt til 3-0 eftir hornaspark, lúrdi ein veruligur stórsigur í luftini.

Hesin kom tó ongantíð. Partvíst tí vágbingarnir settu sær fyri, at hetta skuldi ikki henda, og partvíst tí B36 eftir steðgin einamest tóktist áhugað í at fáa tíðina at ganga.

Tað eydnaðist eisini VB at minka um munin, tá Símun Samuelsen sendi í kassan, men nærri enn tað sama komu teir tó ongantíð.

## Framtíðin fyri VB

B36 hevur nú møguleikan mest sum at staðfesta silvurmerkini, tá teir fara til Fuglafjarðar komandi vikuskifti. Trý stig eru í løtuni niður til Skála, og málmunurin hjá árstalsfelagnum er eisini betri.

Við dystum móti teimum báðum niðastu liðunum eftir, skuldi uppgávan heldur ikki verið ógjørlig, men so er spurningurin, hvussu ávíkavist ÍF og B68 tackla mótgongdina, sum tey uppliva í løtuni.

Hjá VB tykist talan longu nú vera um eina støðu, har felagið einamest skal hugsa um komandi kappingarár. Í Gundadali vóru hvørki Palli Augustinussen ella Mortan í Hørg við, og teir eru helst eisini burturstaddir, tá farið verður undir komandi kappingarár. Stuðlar so sum Eyðun Jacobsen, Jón Pauli Olsen og aðrir, sum ígjøgnum drúgva tíð hava verið berandi element á liðnum, gerast heldur ikki yngri, so hvørt sum árini ganga, so einamest ræður nú um hjá VB at seta við.

Tað hevur felagið eisini í ávísan mun gjørt tey bæði seinnu árini, og úrslitini í yngru deildunum prógva eisini, at tilfarið er til staðar. Spurningurin er so, hvørt hetta eisini er nóg mikið til at halda liðnum uppi millum tey allar bestu komandi árini, ella leiklutin framyvir skal vera meira meinlíkur tí, sum liðið hevur upplivað í ár.

## FAKTA UM DYSTIN

**B36-VB 3-1 (3-0)**
1-0 Ronnie Samuelsen, 6.
2-0 Ronnie Samuelsen, 18.
3-0 Egil á Bø, 42.
3-1 Símun Samuelsen, 68.
**B36:** Magnus Poulsen – Kenneth Jacobsen, Pól Thorsteinsson, Jóhannis Joensen, Arnbjørn Danielsen – Bergur Midjord, Ronnie Samuelsen, Klæmint Matras, Jens Kristian Hansen (Jóhan V. Gunnarsson, 69.) – Egil á Bø, John Petersen.
**VB:** Bjarni Johansen – Eyðstein í Lágabø (John Eystberg, 81.), Anders Sørensen, Jákup Olsen, Kári í Lágabø – Dan Djurhuus, Jóan Pauli Olsen, Milan Kuljic, Símun Samuelsen, Mindaugas Grigalevicius – Sigmund Mikkelsen (Jón Poulsen, 69).
**Gult kort:** - Mindaugas Grigalevicius.
**Dómari:** Dagfinn Olsen

Heysttilboð til Aberdeen
Langt vikuskiftið frá hósdegi til mánadag.
Galdandi til 1. november.

Njótið eitt langt vikuskifti frá hósdegi til mánadag í Aberdeen á einum av okkara frálíku gistingarhúsum.

Patio Hotel ★★★★
Fyri hvønn í tvímanskamari
Kr. 3.235,-

Brentwood Hotel ★★★
Fyri hvønn í tvímanskamari
Kr. 2.918,-

Skene Houese Íbúðir ★★★
Fyri hvønn í íbúð
Prísir úr
Kr. 2.600,-

Festival Inns Hotel ★★★
Fyri hvønn í tvímanskamari
Kr. 2.730,-

Albany Guest House ★★★
Fyri hvønn í tvímanskamari
Kr. 2.785,-

Bílegg ferðina hjá Atlantic Airways á 34 10 10, á www.atlantic.fo ella á tínari ferðaskrivstovu

Íroknað: Flogferð við ferðaavgjøldum og innivist í 4 nætur við morgunmati.

Vanligir ferðaseðlar kunnu eisini bíleggjast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS
www.atlantic.fo

SANSIR · TEL 355 355